# Flogfenaður

## Vistfrøðilig aling av flogfenaði

## Uppruni og tillaging

Bøndur sum fara undir at ala vistfrøðiligan flogfenað mugu fáa hendan fenað frá váttaðum gørðum, um hetta er gjørligt. Um ikki, mugu teir tillaga tann stovnin, sum er frammanundan á garðinum, ella fáa stovn frá siðbundnum gørðum. Tó kunnu ungar, sum eru eldri en tríggir dagar, ikki flytast úr siðbundnari aling, um teir skulu alast til eggjaframleiðslu. Verður tað neyðugt at endurnýggja vistfrøðiligan stovn og vistfrøðiligur flogfenaður ikki kann keypast, kann váttanarstovan loyva tilflyting av upp til 3 dagar gomlum ungum til kjøtframleiðslu og upp til 18 vikur gamlar til eggjaframleiðslu.

Tillagingartíðin vegna vistfrøðiliga  eggja- og høsnarungaframleiðslu er soleiðis:

- Lendi, sum fuglar hava fyri neyðini vegna útivist og bit: 24 mánaðir (harav í minsta lagi 12 mánaðir undir eftirliti av váttanarstovu);
- flogfenaður til kjøtframleiðslu: frá og við gitnaði skulu foreldrini (og síðani avkomini) hýsast undir vistfrøðiligum treytum fyri að kjøtið av avkomunum kann metast at vera vistfrøðiligt;
- flogfenaður til eggjaframleiðslu: liviumstøðurnar hjá flogfenaðinum mugu lúka allar treytir í minsta lagi 6 vikur áðrenn eggini kunnu seljast sum vistfrøðilig vøra.

Møguligt er at tillaga lendi og flogfenaði um somu tíð.

Ansið eftir, at tillagingartíðin roknast frá tí degi, ið váttanarstovan staðfestir við meting at umsøkjarin hevur tikið upp vistfrøðiligar háttir til fulnar.

**Umstøður og viðferð**

Flogfenaðurin skal sleppa at vera úti, tá veðrið er til vildar. Hann skal hava atgongd til opin økir fyri at bíta og grópa. Hesin øki skulu fyri tað mesta vera graslendi, hava lívd fyri veðrum og djórini skulu lættiliga kunna sleppa framat fóðri og drekka. Minstarými fyri hvønn fugl uttandura er 4-4,5 m² fyri hønur og dunnur, 10 m² fyri kalkunir og 15 m² fyri gæs.

Sleppingarøkini mugu friðast ávísa tíð sambært nærri ásetingar frá Tún inntil tey verða aftur brúkt, uttan so at talan er um lítla eind, har einki mark er fyri uttandura rørslu.

Tað er ynskiligt, at nóg góðarr húsaumstøður eru fyri flogfenaðin. Í minsta lagi ein triðingur av gólvflatanum skal vera úr føstum undirlagi og við náttúrligum og ódálkaðum undirburði (hálmi, ódálkanum spønum og avlopspappíri). Tað er bannað at hava fuglar í búrum. Meðan flogfenaðurin er heima við hús, skal hann hava góðar umstøður til að ganga leysur.

Fuglahúsini skulu reinsast regluliga og sóttreinsast fyri at forða fyri sjúkum og smittu vegna óhumsku ella bakteriugróður. Nóg góð útlufting og lýsi skal vera í fuglahúsum.

Gólvflatin í fuglahúsinum skal vera í minsta lag ein fermetur (1 m²) fyri hvør 20 kilo av vektini av livandi fugli í kjøtframleiðslu ella fyri hvør 12 kilo av vektini av livandi fugli í eggjaframleiðslu. Soleiðis verður roknað við, at ikki eru fleiri enn 6 miðalstórar verpingarhønur fyri hvønn fermetur av gólvflatu. Eisini mugu prik í høsnarhúsum vera nóg lang fyri at hvør verpingarhøna hefur minst 18-20 cm rými á priki. Reiður skal fyrirreika soleiðis, at ikki eru fleiri en 8 hønur fyri hvørt hreiður og at miðalrými fyri hvørja hønu ikki er minni en 120 cm². Útgonguop skulu hóska til støddina av fuglunum og vera í  minsta lagi 4 metur fyri hvørjar 100 m² av húsarúmd.

**Fóðrun og heilivágur**

Høvuðsreglan er tann, at fuglar liva av váttaðum vistfrøðiligum fóðri. Inntil 24.8.2005 verður tó loyvt at upp ímóti 20% av ársfóðrinum (roknað í kg av turrevni)  verður framleitt við siðbundnum háttum, um ikki er møguligt at fáa nóg mikið vistfrøðiligt fóður. Lutfall av siðbundnum fóðri í dagskamti kann tó ikki fara uppum 25%.  Í minsta lagi 65% av fóðri fyri alifuglar (til slakting) skal vera korn.

Roynast má at fyrirbyrgja sjúkur við fakligari fenaðardyrking. Um tað ikki er lógarásett, verður eggjað til regluliga royndartøku fyri at kanna um salmonella ella camphylobakter eru vandamál. Um sjúkur koma fram má viðgerð nýtast. Nýta skal náttúrligan heilivág, um tað er gjørligt, annars má sambært leiðbeining frá djóralækna nýta gjørdan heilivág. Ikki verður loyvt at nýta interaktiv evni og penisilin til fyribyrgjandi viðgerð, uttan so at almenn krøv eru um koppseting ella reaktiónir til lokaliseraðar sjúkur. Ikki verður heldur loyvt at nýta heilivág og hormonir at stýra vøkstri. Úrskiljingartíðin fyri heilivág er í minsta lagi 14 dagar, annars tvífaldað lógarbundin úrskiljingartíð.

**Frágreiðingar, eftirlit og váttan**

Nágreiniligar frágreiðinar og/ella journalir mugu haldast um broytingar á fenaðarstovninum, fóðring og heilivági, ið verður nýttur, innkeyp av tilfeingi og sølu av úrdráttum, eisini jarðarnýtsla og reinsan af húsum. Eisini mugu pakningar av keyptum heilivági og fóðri varðveitast. Slíkar frágreiðingar og bókhaldið á garðinum má vera tøkt, tá eftirlitsfólk frá váttanarstovu møtir upp. Metingin hjá váttanarstovu fer fram í minsta lagi eina ferð um árið.

**Dømi um vistfrøðiliga eggjaframleiðslu**

Ein bóndi við 100 hønum til eggjaframleiðslu søkir um váttan og fær meting í juni 2004. Á býlinum er høsnarhús, sum verjir ímóti veðri og vindi og er turt og væl útluftað. Gólvrúmdin at ganga á er í minsta lagi 20 m² og í minsta lagi triðingur av henni er úr føstum undirlagi við ódálkaðum undirburði.  Íalt eru rimarnir 20 m langir, har eru 12 reiður og hvørt sær er umleið 35 cm á hvørja síðu. Bit uttandura er umleið 0,25 ha, sum verða býttir upp í  4-500 m² teigar, sum hvør sær verður nýttur í 3-4 mánaðir í senn. Hvør teigur fær 9-12 mánaðir hvíld ímillum bit. Upplýsingar eru tøkar, sum vísa at bitið ikki var nýtt og/ella fekk ongin forboðin evnir seinastu 12-24 mánaðir áðrenn metingin var gjørd.

Jørðin fær vistfrøðiliga váttan beinanvegin (roknað frá og við fyrstu meting) og kann fáa váttan sum “vistfrøðilig” 12 mánuðir seinni, t.e. várið 2005. Tillaging av hønum kann gerast um somu tíð sum fyrstu vistfrøðiligu eggini koma frá hesi eind, t.e. várið 2005.